


# Ársfrágreiðing

# 2019

# Ársfrágreiðing 2019

Her verður í stuttum greitt frá virkseminum hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd í 2019. Sambært viðtøkunum skal Ráðið fyri Ferðslutrygd í fyrsta lagi gera ferðsluna tryggari við at betra ferðsluvanarnar við upplýsing og fjølbroyttum fyritakssemi, við støði í Nullhugsjónini.

## Ein læt lív í ferðsluni í 2019

2019 bleiv ikki eitt eins gott ferðsluár, sum 2018, har ongin doyði í ferðsluni. Hetta var fyrstu ferð í hálva øld, at ongin doyði í ferðsluni í Føroyum.

Í juni mánaða doyði ein 51 ára gamal maður av løstum, sum hann fekk í eini ferðsluvanlukku á prutli. Hendingin fór fram í Suðuroy.

Handan hvørja ferðsluvanlukku krógvar ein søga seg. Í fyrstu atløgu hjá henni/honum, sum hevur fingið skaða, ella hevur mist lívið. Men ein ferðsluvanlukka rakar nógv meinari, enn tann, sum verður beinleiðis rakt/ur. Hon rakar eisini familjuna – foreldur, børn, systkin. Vinfólk, starvsfelagar, grannalagið.

Seinastu árini er talið av álvarsligum ferðsluvanlukkum nógv lægri, enn tað var í syrgiligu 70- og 80-unum, tá alt ov nógvar vanlukkur kravdu lívið á ofta heilt ungum fólkum. Hesa gongdina kunnu vit bara at fegnast um. Tað er ein týðilig ábending um, at tað miðvísa arbeiðið, sum er gjørt seinastu nógvu árini, ber frukt.

Herd lóggáva, eftirlit, betri og tryggari vegir, tryggari bilar og ikki minst áhaldandi upplýsing og átøk eru við til at gera okkum øll meiri upplýst og tilvitaði um vandarnar í ferðsluni og harvið okkara egna møguleika at gera mun.

Eins og undanfarin ár samanbera vit okkum við nærmastu grannalond okkara. Har síggja vit, at enn er nakað eftir á mál, skulu vit náa eins góðum ferðslutølum og eitt nú Noreg, sum seinnu árini hevur havt bestu úrslit av norðurlondunum. Av tí at Føroyar eru smáar og okkara hagtøl eru smá, kann ein álvarslig ferðsluvanlukka ávirka hagtølini ógvusliga. Vit hyggja tí vanliga eftir einum 5 ára miðaltali.

Tá vit samanbera okkum við hini norðurlondini, verða tølini brúkt við útgangsstøði í tal av deyðum í ferðsluni pr. 100.000 íbúgvar. Seinastu árini hava Føroyar ligið aftast samanborið við hini norðurlondini, men við lækkandi tølunum seinnu árini, liggja Føroyar fyri 2019 á 2,7 deyð pr. 100.000 íbúgvar (5 ára miðal).




Í talvuni omanfyri eru tølini samanborin við hini norðurlondini. Fyrivarni verður tikið fyri tølunum frá hinum norðurlondunum, tí tølini fyri 2019 eru ikki endaliga fráboðað enn. Tó síggja vit, at Finland og Danmark liggja hægst við gott 4 deyðum pr. 100.000 íbúgvar. Svøríki, Noreg og Ísland liggja øll lægri enn Føroyar við uml. 2 ferðsludeyðum pr. 100.000 íbúgvar. Neyðugt er at hava í huga, at Ísland, eins og Føroyar, hava smá hagtøl, og tí ávirka sveiggj í tølunum eisini serliga nógv. Tað ber kurvan eisini boð um.

## Ferðsluóhapp við fólkaskaða

Fyribils tølini fyri 2019 vísa, at 35 ferðsluóhapp við fólkaskaða vóru skrásett hjá politinum.

Hetta er eitt vet hægri enn fyri 2018, tá talið av ferðsluóhappum við fólkaska var 30 (har rúsdrekka, ella rúsevni/heiligvágur vóru til staðar í 2 teirra). Talið av ferðsluóhappum við fólkaskaða hevur ligið millum 30 og 35 síðani 2009-10, tá fleiri broytingar í ferðslulógini vórðu gjørdar. Millum annað varð promillumarkið broytt og skipanin við klipp í koyrikortið varð tikin í nýtslu.

Av teimum 35 ferðsluóhappum við fólkaskaða, var rúsdrekka til staðar í 4 teirra, meðan rúsevni/heiligvágur var til staðar í 1 óhappi.




Í 2019 skrásetti politiið í alt 19 ferðsluóhapp við rúsdrekka (harav 4 við fólkaskaða) og 6 ferðsluóhapp við rúsevnum/heiligvági (harav 1 við fólkaskaða).

Framhaldandi tørvar okkum betur hagtøl og neyvari greiningar av ferðsluóhappum við fólkaskaða. Serligan týdning hevur tað, at óhapp við fólkaskaða verða flokkaði, tá tey verða skrásett, soleiðis at yvirlit fæst yvir, hvussu álvarsligir skaðarnir eru. Í grannalondunum verður vanliga flokkað í hesum stigum: deyðsvanlukka, álvarsligur fólkaskaði og minni álvarsligur fólkaskaði.

## Nýggj ferðslutrygdarætlan

Í 2019 varð ferðslutrygdarætlanin fyri Føroyar dagførd. Ferðslutrygdarætlanin 2019-2027 byggir víðari á stóra arbeiðið, sum undanfarnu 'Álit um Nullhugsjón' og 'Ferðslutrygdarætlan 2008-2015' hava lag lunnar undir.




Í nýggju ferðslutrygdarætlanini eru nýggj yvirskipaði mál og tilmæli, til tess at koma nullhugsjónini enn nærri.

Yvirskipaða málið er, at talið av ferðsluóhappum við fólkaskaða skal vera 30% lægri í 2027 í mun til 2018. Við støði í 8 ymiskum fokusøkjum eru 70 ymisk tilmæli til, hvussu málið kann røkkast. Fyri hvørt teirra er ásett hvør stovnur ella myndugleiki hevur ávirkan á, at júst hetta tilmæli kann fremjast. Hetta soleiðis at øll, sum vara av – myndugleikar, stovnar og allir føroyingar – taka ferðslutrygdarætlanina 2019-2027 til sín.

Við dagførdu ferðslutrygdarætlanini er týdningurin av betri hagtølum enn einaferð staðfestur, til tess at kunna málrætta átøkini, har tað veruliga ger mun. Harumframt stendur tilmælið um eina skaðanevnd við, soleiðis at álvarsligu vanlukkurnar kunnu nágreinast og vónandi fyribyrgjast í framtíðini.

Endaliga er sera týdningarmikið, at ferðslutrygdarætlanin javnan verður dagførd, so hon altíð vísir røttu myndina av dagsins avbjóðingum á ferðslutrygdartøkinum og soleiðis at tað altíð er púra greitt, hvørji málini eru og hvør varar av, at tilmælini verða framd og at málini verða fylgd upp.

## Landsfevnandi átøk í 2019

Ráðið fyri Ferðslutrygd hevur í 2019 framt átøk viðvíkjandi sløktum baklyktum, gáloysni, rúsdrekkakoyring, skúlabyrjan, ferð og endurskin. Umframt árligu afturvendandi tiltøkini ferðsludagar fyri 8. flokkum, súkkluhjálmum og endurskinsvestum til yngstu skúlanæmingarnar.

Til átakið um gáloysni og skúlabyrjan vóru kommunurnar bodnar við og heilt nógvar teirra tóku av. Vit vóna at hetta samstarv kann halda fram og at fleiri kommunur ynskja at luttaka. Hetta so átøkini fáa størri slagmátt og røkka betur út í lokalu økini.

**Sløktar baklyktir**

Í februar 2019 mintu vit bilførarar á at tendra baklyktirnar.

Flestu nýggju bilar hava eina 'auto' funku til billjósini. Soleiðis tillagar bilurin sjálvur ljósini eftir umstøðunum. Tíverri er trupulleikin tann, at bakljósini ikki tendra sjálvvirkandi, fyrr enn tað er ræ̈ttiliga myrkt. Hetta sæst serliga í skýming, toku, kavaroki ella lutvíst upplýstum tunlum, við tað at her tendra baklyktirnar ofta ikki.

Við ljóð-lýsingum á útvarpsrásum fingu bilførarar hesa áminningina, har hon veruliga munar. Nevniliga meðan fólk vóru á veg til arbeiðis, sótu í bilinum og kundu harvið beinleiðis ávirkast til at kanna bakljósini.

Í februar/marts 2020 eru vit farin undir samstarv við Akstovuna um billyktir. Við spurnarkanningum royna vit á skemtiligan hátt at prika til uppmerksemið og virðingina fyri billyktunum. Nevniliga at ljósini eru tendrað, at kanna um perurnar lýsa og um lyktirnar eru rætt stillaðar.



**Gáloysni**



Um mánaðarskiftið apríl/maj 2019 varð átakið frá 2018 um gáloysni endurtikið. Átakið við spurninginum ”Hvar eru tankarnir, tá tú koyrir bil” varð fyrstu ferð framt í januar 2018. Boðskapurin kom fram í filmi, sum var vístur á alnótini, í miðlum og biografi. Eisini plakatir, vindeygaklistrimerki og ’tig og koyr’ sleikisneisir vóru partur av átakinum.







Boðskaðurin í átakinum er greiður. Hvussu langt koyrir tú í blindum, um tú hyggur burtur frá vegnum í nøkur sekund. T.d. við at lesa sms-boð á telefonini. Koyr bil, tá tú koyrir bil.

Heili 16 kommunur valdu at luttaka í átakinum. Við átakstilfari at seta á sjónlig støð í lokalu økjunum og 'tig og koyr'-sleikisneisir at býta út, kom boðskapurin í átakinum sera væl út og hetta eru vit glað fyri.

Kommunurnar, sum luttóku vóru: Eystur, Fuglafjarðar, Klakvsíkar, Kunoyar, Kvívíkar, Nes, Porkeris, Runavíkar, Sands, Sumbiar, Sørvágs, Tórshavnar, Vága, Vágs, Vestmanna og Viðareiðis kommuna.



Eisini politiið var við í átakinum og tá politiið gjørdi kanningar hesar dagarnar, góvu politistarnir bilførarum 'tig og koyr'-sleikisneisir, sum áminning um at vera ansin í ferðsluni.

Seinnu árini hava vit spurt føroyingar um teirra hugburð til nýtslu av handhildnari telefon, meðan koyrt verður. Lóður gjørdi í 2019 eina umfatandi kanning av atburði í ferðsluni og hugburðinum til ferðslutrygd í Føroyum. Parturin av fólki, sum siga seg ongantíð tosa í telefon, meðan tey koyra bil er 45% og er hetta talið lægri enn undanfarnu árini. Tey, sum siga seg gera hetta av og á, ella ofta/altíð er 21% og er hetta talið hægri enn seinnu árini.

Aldursbýtið vísir, at millum yngru bólkarnar er talið á teimum, sum av og á, ella ofta/altíð nýta handhildna fartelefon, meðan tey koyra, markant hægri, enn millum eldru bilførarar.

Í aldursbólkinum upp til 29 ár, siga 29% seg brúka telefonina, meðan tey koyra av og á, ella ofta/altíð. Talið fyri tey 30-39 ára gomlu er 28%.


Atferð
Hvussu ofta
0% 10% 20% 30% 40% 50% 60% 70% 80% 90% 100%
...koyrir tú ávirkað/ur?
98%
...tosar tú í fartelefon uttan snigil ella headsett, ímeðan tú sjálv/ur ert bilførari/koyrir?
45% 35% 14% 7%
...brúkar tú fartelefonina til lesa og senda sms, lesa/senda teldupost ella til spøl v.m. ímeðan tú sjálv/ur ert bilførari?
72% 19% 7% 3%
...koyrir tú skjótari enn tað er loyvt?
11% 25% 36% 28%
Aldrin Sjáldan Av og á Ofta/altíð Veit ikki
LÕÐUR


Atferð
...tosar tú í fartelefon uttan snigil ella headsett, ímeðan tú sjálv/ur ert bilførari/koyrir?
30% 25% 20% 15% 10% 5% 0%
18% 11% 15% 13% 22% 3% 13% 5% 3% 3%
15-29 ár 30-39 ár 40-49 ár 50-59 ár 60-75 ár
Av og á
Ofta/altíð
...brúkar tú fartelefonina til lesa og senda sms, lesa/senda teldupost ella til spøl v.m. ímeðan tú sjálv/ur ert bilførari?
30% 25% 20% 15% 10% 5% 0%
9% 5% 15% 6% 9% 0% 3% 2%
15-29 ár 30-39 ár 40-49 ár 50-59 ár 60-75 ár
Av og á
Ofta/altíð
LÕÐUR

Men samstundis, sum fólk í alt ov stóran mun siga seg javnan tosa í handhildna fartelefon, meðan tey koyra bil, meta tey eisini at fartelefonin er ein tann fremsta høvuðsorsøkin til, at fólk fáa skaða í ferðsluni. Bara ov nógv ferð, verður mett størri skaðaorsøk.




Lítið er at ivast í, at tørvurin á framhaldandi átøkum á hesum økinum eru ógvuliga týdningarmikil og átakið verður eisini endurtikið í 2020.

**Valplakatir**
Tvær ferðir í 2019 vóru føroyingar á vali. Tann 5. juni var val til danska fólkatingið og 31. august var Løgtingsval.

Við eini vegleiðing frá Landsverk um trygga staðseting av valplakatum, stóðu Landsverk, Kommunufelagið, Politiið og Ráðið fyri Ferðslutrygd saman um áheitanina á politisku flokkarnar og valevnini, um at lata seg í ferðslutrygdarhattin, tá valplakatirnar skuldu heingjast upp.

Seinnu árini er rákið um at hava størri valplakatir vorðið heilt eyðsýnt og stór kapping er um, at sleppa framat støðunum, har bilførarar hava størstan møguleika at síggja plakatirnar. Eisini gerast digitalir skíggjar, í stórari stødd og á sera sjónligum støðum, alt fleiri í tali. Og hetta kann føra til gáloysni í ferðsluni. Hóast nakað er eftir á mál á hesum økinum, eydnaðist tað at fáa miðlar og føroyingar annars at tosa um hetta við umhugsni fyri ferðslutrygdini, tá valplakatir skulu hangast upp. Og tað er gott, tí føroyingar skulu longu aftur til atkvøðuklivarnar, tá veljast skal til kommunuval í november 2020.



**Rúsdrekka**
Í juni og aftur í november/desember mintu vit, saman við Trygd og Betri, føroyingar á at steðga rúskoyring, har bygt var á filmin, 'Ein skeiv avgerð kann broyta nógv ... kanska alt'.

Átakið var fyrstu ferð framt á jólum í 2016. Í 2020 verður nýtt rúsdrekkaátak framleitt.




Kanningar hava víst, at føroyingar vilja ikki vita av rúdsrekkakoyring. Heili 98% siga, at tey ongantíð koyra ávirkaði. Í Ferðslutrygd eru vit ikki bilsin. Hugburðurin ímóti rúsrekkakoyring er óvikiligur millum tey flestu. Men hjá summum kann vera langt frá hugburði til atferð. Tí rúsdrekkakoyring er framvegis orsøk til álvarsligar ferðsluvanlukkur. Umframt at filmurin varð vístur á portalum, bar eisini til at fáa plakatir, klistrimerki og tatoveringar við sama boðskapi.



**Heilt appilsinfríur**
Í 2019 byrjaðu vit eitt nýtt spennandi samstarv við Bláa Kross Føroya. Ein nýggjur alkoholfríur ‘kokkteylur’ varð uppfunnin saman við kokkinum Gutta Winther. Drykkurin varð doyptur ’Heilt appilsinfríur’ og er hann eitt leskiligt alkoholfrítt alternativ at bjóða teimum í veitsluni, festivalinum, ella stevnuni, sum skulu koyra heim aftaná.

Uppskriftin varð sett upp sum ein innbjóðandi plakat, sum lættliga kann prentast, so øll kunnu royna seg sum barrvør heima.

Á Voxbotn, G! festivalinum, Ólavsøku og Summarfestivalinum vóru ókeypis smakkiroyndir skonktar og afturmeldingarnar vóru sera jaligar.

Í 2020 er ætlanin at menna ein nýggjan alkoholfrían kokkteyl saman við Bláa Krossi.



**Skúlabyrjan**
Í august 2019, tá skúlarnir byrjaðu aftur, framdi RFF átak í samstarvi við kommunur, har bilførarar vórðu mintir á at ansa eftir skúlabørnunum við skúlarnar. Hetta við plakatum. Endamálið var at gera vart við, at í sambandi við skúlabyrjan eru aftur fleiri børn í ferðsluni, og eisini børn, sum kanska eru nýggj í ferðsluni og hartil smá og tískil ikki síggjast so væl.

Í nøkur ár hevur Ráðið fyri ferðslutrygd boðið kommununum at luttaka í átøkum og talið av kommunum, ið taka av hesum tilboði veksur fyri hvørja ferð. 13 kommunur luttóku í átakinum í sambandi við skúlabyrjan hesaferð. Hesar vóru: Eiðis, Eystur, Fuglafjarðar, Hvalbiar, Klaksvíkar, Kvívíkar, Runavíkar, Sjóvar, Tórshavnar, Tvøroyrar, Vága, Vágs og Vestmanna kommuna.



**Ferð**
Í oktober 2019 fór spildurnýtt ferðátak av bakkastokki. RFF samstarvar við Betri, Landsverk og Trygd um hetta átakið, sum við orðingini 'Halt hámarksferðina, ókey?' skal fáa fólk at hugsa um avleiðingarnar við at koyra ov skjótt.

Tað er ikki bara tú, sum verður rakt/ur av eini ferðsluvanlukku, men øll kringum teg verða eisini rakt. Filmurin setir orð á óhugnaliga tankan um, hvør skal siga einum eftirsitandi barni, at mamma ikki kemur heim aftur, tí hon koyrdi ov skjótt og var í eini ferðsluvanlukku. Tíbetur veit mamman í filminum betur, tí hon hevur lurtað eftir áheitanini um at halda hámarksferðina.




Boðskapurin í átakinum kom fram í filminum, sum varð vístur á alnótini, í miðlum og biografi.

Eisini varð áminning um hámarksferðina mála á landsvegir á útvaldum støðum kring landið. Støðini vóru útvald eftir fortreytunum at tað eru støð, har bilar koyra ov skjótt og á flestu støðunum hevur Landsverk eisini fastar teljistøðir.

Átakið verður endurtikið í 2020 og vónandi verður møguligt at síggja á ferðsluteljingunum, at átakið ger mun og fær bilførarar at seta ferðina niður.



Ov nógv ferð er ein stór avbjóðing fyri ferðslutrygdina. Ov nógv ferð økir um vandan fyri at óhapp henda og skaðarnir av ferðsluóhappum verða størri og ógvusligari, tess skjótari koyrt verður.

Heili 52% av føroyingum meta at ov nógv ferð er tann størsta orsøkin til, at fólk fáa skaða í ferðsluni (sí s. 11). Men samstundis siga fólk seg í alt ov stóran mun javnan koyra ov skjótt. Serliga á vegum, har mest loyvda ferð er 80 km/t. 64% siga seg koyra skjótari enn mest loyvdu ferð á vegum við mest loyvdu ferð á 80 km/t.



**Skara framúr**

Á facebook mintu vit føroyingar á at nýta endurskin við áheitanini 'Skara framúr – nýt endurskin!'

Um veturin er sera myrkt í Føroyum. Tað er myrkt, tá vit fara heimanífrá um morgunin og tað er myrkt, tá vit koma heim aftur eftir arbeiðstíð. Tí er sera týdningarmikið at vera sjónlig/ur í ferðsluni.

Vit hava altíð endurskin á skrivstovuni og nógv nýta høvi at koma framvið eftir endurskinum og at fáa eitt gott prát um ferðslutrygd. Tryggingarfeløgini Trygd og Betri lata endurskinini.




'Skara framúr' varð gjørt í trimum variantum, umframt at ársins jólakort eisini hevði ein framúrskarandi boðskap.



# Afturvendandi átøkini

## Ferðsludagar fyri 8. flokkum

Ferðsludagarnir vórðu hildnir fyri 8. flokkum á vári 2019. Fyrstu ferðsludagar fóru av bakkastokki í 1998 og hava verið hildnir at kalla á hvørjum ári síðani. Hesi árini er tiltakið tillaga og dagført, men í høvuðsheitum er yvirskipaða málið tað sama - at læra um vandar í ferðsluni, avleiðingar av avgerðum okkara og tvístøðum um hvat kann gerast fyri at fyribyrgja og hvat er 'rætta' reaktiónin, tá skaðin er hendur. Tiltakið er samskipað av Ferðslutrygd og stuðlað av Trygd og Betri Trygging.











Seinnu árini hevur tiltakið verið í Perluni í Tórsgøtu, men í 2019 varð tiltakið flutt yvir í felagshølini hjá Starvsmannafelagnum. Hesi hølini eru sera væl egnaði til endamálið og í januar/februar 2020 hava vit soleiðis aftur havt ferðsludagar fyri ársins 8. flokkum.





**1-1-2 dagar í Havn og í Skálavík**

RFF tók lut á árligu 1-1-2-døgnum, har løgreglan, brandstøðin, sjúkraflutningstænastan og Ferðslutrygd møta elstu barnagarðsbørnunum. Í 2019 vóru tveir 1-1-2 dagar. Tann fyrri var 16. maj í Sandoynni (dagurin varð hildin á hotel Skálavík). Tann seinni var 29. maj í Badmintonhøllini í Havn.









**Súkkluhjálmar og endurskinsvestar til 1. floksnæmingar**
Sum helst tey einastu í heiminum fáa øll børn í Føroyum, sum fara í 1. flokk, hvør sín súkkluhjálm til gávus. Hjálmarnir verða latnir í samstarvi við Betri og Trygd.

Eisini fáa teir yngstu næmingarnir (1. flokkur, ella forskúli) endurskinsvest frá Betri.

Her eru tað næmingar í 1. flokki í Skúlanum á Giljanesi, sum hava fingið vestar og hjálmar.



## Framlítandi virksemi RFF

Eftir at Ráðið fyri Ferðslutrygd í fleiri ár staðiliga hevur víst á týdningin at dagføra ferðslutrygdarætlanina, sum gekk út í 2015, eydnaðist hetta loksins í 2019. Arbeiðið varð gjørt á vári 2019 og nýggja ferðslutrygdarætlanin varð handað landsstýrismanninum í samferðslumálum, tann 21. juni. Nett sama dag hendi ein ferðsluvanlukka í Suðuroy, sum seinni kostaði einum 51 ára gomlum manni lívið.

Samstundis sum vit fegnast um, at talið av álvarsligum ferðsluvanlukkum framhaldandi er lágt og at ongin doyði í ferðsluni í 2018 (nakað sum ikki er fyrikomið síðani 1967), er tað týdningarmikið at halda fram við miðvísa ferðslutrygdararbeiðinum. Tí at hvør einasta ferðsluvanlukka er ein ov nógv.

Við nýggju ferðslutrygdarætlanini eru mál og tilmæli fyri ferðslutrygdararbeiðinum komandi árini dagført. Við 8 fokusøkjum og 70 tilmælum er ferðslutrygdarætlanin eitt boð uppá, hvussu málið kann náast. Málið fram til 2027 er 30% færri ferðsluóhapp við fólkaskaða enn í 2018.

Týdningarmikið er, at ferðslutrygdarætlanin javnan verður dagførd, so hon altíð speglar dagsins avbjóðingar í ferðsluni. Tað er av stórum týdningi, at skaðanevnd verður sett á stovn, sum kannar álvarsligu ferðsluvanlukkurnar, og at áhaldandi verður arbeitt fyri betri hagtølum.

Ráðið fyri Ferðslutrygd fer, við støði í dagførdu ferðslutrygdarætlanini, at arbeiða miðvíst við teimum tilmælum í ferðslutrygdarætlanini, sum RFF varar av – m.a. átøk, undirvísing og hugburðskanningar. Harumframt er ætlanin at byrja árligar kanningar av nýtslu av trygdarbelti.

Neyðugt er framhaldandi at virka fyri átøkum at betra um vanarnar í ferðsluni. Hetta í góðum stevi við aðrar partar, sum á hvønn sín hátt arbeiða fyri betri ferðslutrygd. Átøk mótvegis stóru skaðafaktorunum í ferðsluni (ferð, gáloysni og rúsdrekka) halda sostatt fram, eins og afturvendandi tiltøkini mótvegis børnum og ungum.

*30. apríl 2020*
*Ráðið fyri Ferðslutrygd*